# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Leiklutur Danmarkar í ES máli

Per Stig Møller má koma við einum boði uppá leiklut Danmarkar við atliti at betri og tættari samstarv Føroya við ES og EFTA. Men almenningurinn má eisini kunnast betri um royndir landsstýrisins í so máta.
Tað er ikki sørt áhugavert, at Per Stig Møller, danskur uttanríkisráðharri, vitjar í Føroyum í døgunum 9. og 10. oktober. Løgmansskrivstovan boðar frá, at fundir millum løgmann og uttanríkisráðharran verða úti í Tinganesi. Á skránni er nógv áhugavert eitt nú føroyska sambandið við ES og EFTA. Harafturat verður dagførd kunning um aktuell mál.
Ásannast má, at fundarevnini eru sera aktuel, og at tað er í tøkum tíma, at hesi evni verða tikin upp. Meðan alt Europa, tað veri seg limalond so væl sum lond uttan fyri ES samstarva um at kalla alt millum himmal og jørð, so liggja Føroyar uttan fyri hetta samstarv. Vit selja fisk, fiskaúrdráttir og annað gott úr okkara reina og heilsugóða umhvørvi, og annað samband hava vit eftir øllum at døma ikki. Tann lyftisgrein um annað samstarv, sum er í handilssáttmála Føroya við ES tykist ikki verd tað pappír, ið hon er ritað á. Hóast føroyskir myndugleikar í áravís hava strongt á at fáa í lag samstarv við ES um gransking, útbúgving, mentan og loftferðslu, so eru vit eftir øllum at døma ikki komin úr stað.
Henda støða er ikki haldgóð, og henda støða kann ikki halda fram. Nú má almenningurin hava at vita, hvat ið er galið. Er tað ES, sum als einki vil hava við okkum at gera? Eru tað okkara samráðingarfolk, sum ikki duga at "selja vøruna", ella er tað okkara statsrættarliga støða, sum forðar fyri samstarvi um annað enn at keypa og selja fisk og fiskaúrdráttir? Ella er tað so galið, at tað er Danmark og danska uttanríkisráðið, sum liggja í buktini? Hvør er leikutur Danmarkar í hesum máli? Hvussu gongur við EFTA málinum? Hvussu ber tað til, at løgmaður setur alla sína prestisju inn á hetta mál, og so hendir eftirfylgjandi púrt einki? Almenningurin, vinnan, granskingin, lærdómssetrini o.m.o. hava nú bíðað so leingi eftir einari avkláring av ES málinum, at bíðast kann longur. Almenningurin hevur krav uppá at fáa púra greitt at vita, hvørjir trupulleikarnir við atliti at okkara trótandi samstarvi við ES eru og um vit fáa ta hjálp og tann diplomatiska og politiska stuðul úr Danmark, sum vit hava krav uppá. Vónandi eru vit vorðin klókari, tá uttanríkisráðharrin er farin av aftur landinum.

**Sosialurin**

## Menn í politikki

EYÐGUNN SAMUELSEN
Demokratia



Skjótt farna tíðindavikan hevur givið eina sera hugvekjandi og góða mynd av monnum í politikki.

Vikan byrjaði við framløgu um alternativan flogvøll. Alt eftir um hann verður í Søltuvík ella á Glyvursnesi verður kostnaðurin fyri henda flogvøll mettur til ávikavist 960 milliónir ella 1,68 milliard. Í sama viðfangi verður nevnt, at nú er klárt at útbyggja Vága floghavn, alt gott um tað. Kostnaðurin fyri hesa neyðugu útbygging er umleið 440 milliónir. Annars lendi sjálvur Clinton, fyrrverandi forseti í USA á flogvøllinum í vikuni, so støðan við einum flogvølli er ikki verri enn so.

Seinni í somu viku kom næsta boðið, altjóða floghavn í Nólsoy – hetta krevur undirsjóartunnil til Nólsoyar – men tað er í lagi sigur borgmeistarin í Tórshavn. Kostnaðurin av hesum báðum íløgum er ikki kannaður enn.

Eisini hesa vikuna var Sandoyartunnilin á skrá. Ein tinglimur sigur, at hann vil slíta samgonguna verða ikki pengar settir av til henda tunnil, her og nú. Kostnaðurin fyri Sandoyar tunnilin liggur upp ímóti milliardini. Fyri ordans skyld skal nevnast at ein maður, Magni Laksafoss fíggjarmálaráðharri hevur sagt, at hann meinar henda íløga eigur at bíða.

Dagin eftir kemur triðja boðið, tunnil og flogvøll í Svínoy. Tunnilin kostar bara 250 milliónir so tað er upplagt at tvinna hendan saman við einum flogvølli. Hetta hugskoti kemur frá varaborgmeistaranum í Klaksvík.

Nú tíðindavikan er um at enda harmast borgarstjórin á Viðareiði, at tunlarnir norður um Fjall verða útsettir, tí peningur er bert settur av til framhaldandi prosjektering av tunlunum á fíggjarlógaruppskotinum fyri 2008. Ein og ein hálv millión krónur til framhaldandi prosjektering av tunlunum norður um Fjall.

Sum rosinan í pysluendanum er landsbankastjórin í tíðindunum og sigur nakað soleiðis.

"Tær umleið 1270 milliónir krónur, sum landskassin fekk við at selja tveir triðingar av Føroya Banka, standa í Landsbankanum og gera, at gjaldførið í landsbankanum nú komið líka uppum tvær milliardir. Tað eru góðar 500 milliónir krónur meira enn minsta-innlán, men pengarnir komu á eitt turt stað, tí áðrenn Føroya Banka søluna var gjaldførið langt niðan fyri minstainnlánið."

Kanska hoyrdi ongin hann?

Hesir menn, ið her eru nevndir eru ikki tiknir fram sum annað, enn eitt dømi um menn í politikki, í hvussu er hesa vikuna. Ongin er betri enn annar, uppskot um millióna og milliardaupphæddir til grót og betong kemur úr øllum flokkum. Eitt felagseyðkenni er, allir eru menn.

At enda, vil eg sitera ein viðmerkjara á Norðlýsinum, (kyn ikki upplýst), ið sigur:

"Hví ikki tað, ein í Svíni og ein í Nólsoy, ein í Søltuvík, ein á Glyvursnesi, ja og ein alternativan í Vágum, og kanska ein í Suðuroy, so kan mann kalla Føroyar (Aviation Island) Nei hugsa heldur um tey veiku gomlu, sjúku og so kanska børnini, har er nokk at brúka pengar til."

Álvaratos, nú má vend koma í!

## Nýtt Klaksvíkar Sjúkrahús

JÁKUP PETERSEN
yvirlækni



Bygningarnir í føroyska sjúkrahúsverkinum hava havt eina langa søgu við krotusmiði og forfalli. Men seinastu árini er ein miðvís nýbygging og útbygging farin fram soleiðis, at nú er komið til Klaksvíkar Sjúkrahús.

So vítt eg minnist, so varð tað táverandi landsstýrismaðurin í heilsumálum, Jóannes Eidesgaaard, sum setti eina kanningarnevnd av serkønum innan kanning og viðgerð fyri at gera ein úrskurð um hølisviðurskiftini í føroyska sjúkrahúsverkinum.

Nevndin kom til ta niðurstøðu, at tað stóð illa til og at verst var á Suðuroya Sjúkrahúsi. Niðurstøðan varð so brúkt sum grundarlag fyri at seta skøtil á tað stórverk sum kom, at verða endurnýggjan og nýbygging at verkinum.

Av tí at viðurskiftini á Tvøroyri vóru út av lagi vánalig varð byrjað har, og í 1995 stóð eitt nýtt og snotuligt Suðuroyar Sjúkrahús klárt at flyta inn í. Hetta varð ein stórur dagur fyri suðuroyingar og ikki ein minni stórur dagur fyri sjúkrahúsverkið og Føroya folk.

Næsta átakið varð so Landssjúkrahúsið og longu í 2004 stóð reysti G-bygningurin við hølum og tólum til reiðar at taka ímóti vónfulla starvsfólkinum. Síðani hevur ein miðvís umbygging av eldra partinum av sjúkrahúsinum farin fram. Einar 35 milliónir árliga í eini 10 ár tykist at verða málið.

Nú er so tíðin at enda komin til at byggja nýtt sjúkrahús í Klaksvík. Í ár kom so "Álit um framtíðar sjúkrahúsverk í Føroyum", sum millum annað ræður til munandi ábøtur á bygningarnar á Klaksvíkar Sjúkrahúsi fyri at klára komandi avbjóðingar.

Landsstýrismaðurin í Almanna- og Heilsumannaráðum, Hans Pauli Strøm, hevði tí á fundi ta viðmerking, at skøtil skuldi setast á Klaksvíkar Sjúkrahús í 2009. Hetta vil siga um gott og væl eitt ár. Farið er tí í gongd við at fáa pening til at projektera hetta verk.

Starvsfólkið á Klaksvíkar Sjúkrahúsi hevur longu í drúgvum bólkaarbeiði gjørt eitt tilmæli til leiðsluna viðvíkjandi metta tørvinum. Í løtuni verður so bíðað eftir eini minni játtan frá Landsstýrinum fyri at seta gongd á málið.

Hetta eru góð tíðindi fyri borgarnar í Norðuroyggjum, Eysturoy og restini av Føroyum. Tað nýggja Klaksvíkar Sjúkrahús verður sostatt tann seinasti luturin í nýggju og framkomnu karmunum um Sjúkrahúsverk Føroya.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støddi:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.